# Og kjakast, ilskast, fegnast...



gekk sera væl og fólk tóktist taka hana til sín, hóast hetta var at seta ferðina rættiliga nógv niður, eftir at kvøldið sum heild hevði gingið við, at tónleikarar høvdu baksast við at fáa fjøldina upp í ferð.

Kristleif tóktist standa á tryggari grund við Arnold og Rógva sum tónleikaligum botni, og við einum hvítrandaðum botni kring teir heldur stóru gummiskógvarnar. Gjøgnumført bóndablues og gras, ella hvat slíkt eitur á fakmáli.

## Go

So vóru tað GoGo Blues. Lagt var beinanvegin til brots og tað riggaði frá fyrstu løtu. Trummur og bassur swingaðu og Uni fekk loyvi at hugna sær. Og tað sá út og ljóðaði, sum tað var tað hann gjørdi.

GoGo er blues, sum tað eigur at vera og framførslan var eisini sum hon skuldi. Hon prógvaði, at GoGo hava megnað at vekja blueskensluna í føroyska lurtaraskaranum og at teir fáa loyvi at halda seg til sítt - treytaleyst, tí stílurin er reinur og júst sum hann eigur at vera.

I'm Gone er ein landaplága, óivað ein av teim fáu í Føroyum, sum kemur undir tónlistaslagið blues.

## Fressar

Terji Rasmussen Band streyk avstað, sum fressar í føstu. Har var trýst á og tónleikurin er væl lagdur tilrættis.

Handverkið kom til sín rætt hjá royndu tónleikarunum og Terji kundi gera tað, ið hann dugir best; at standa á palli og at hava samband við fjøldina. Var nakar veikleiki, so var tað í onkrum lag, at Terji sjálvur kanska passaði meira uppá at halda seg til framførslu, heldur enn sangin.

Hjalti slapp at spæla rock og solo og gjørdi tað væl, sum so ofta. Og hinir fressarnir hjá Terja gjørdu tað, teir duga best, nevniliga at spæla tað teir eru mentir og hugna sær við góðum útsetingum.

## So nógvar røddir

Tað nevndist lagið, sum Eyðun Nolsøe og Showmenn løgdu fyri við. Og røddirnar manglaðu ikki, tá Kim Jens Marni og James sungu við, umframt at Johannes legði botn í

Fólkakendur poppur frá Eyðuni, sum tó ljóðar eitt sindur harðari, enn hann gjørdi, um leitað verður nøkur ár eftureftir.

Við góðu showmanningini helt hann avstað og kom turrur á land hinumegin. Vælswingandi gamli kenningurin Dansa var komin in í skránna fyri annað av nýggju løgunum, og setti hetta ferð á fjøldina, innan seinasta lagið leygarkvøldið ljóðmaði frá tungu dreingjunum innan føroyskan tónleik.

## Prix og mentalitetur

At Eyðun Nolsøe, Terji Rassmussen og Uni og GoGo Blues komu víðari í finaluna tykist at vera sumum ein beiskur biti.

Kjakast verður av álvara um, hvørt úrslitið er rætt, um røttu nøvnini komu í finaluna. Um ikki gomlu, royndu nøvnini hava havt sína tíð. Og hvørt dómararnir gjørdu sítt. Men eisin um, kanska meira av røttum, hvørt skipanin skal endurskoðast og hvørt tær treytir, sum áliggja dómarunum at døma eftir, eru nóg goðar.

Kjakið er áhugavert. Greitt er í øllum førum, um ein lesur bløð, netsíður og lurtar, at prixið er nakað, fólk hava metingar um. Og tey yngru kenna seg snýtt ella eru skuffaði, tí yngru kreftirnar í semifinaluni ikki komu á ovastu rók, har teir royndu tóku sessirnar.

Og kjakast kann av røttum - heldur enn aldur og annað - um skipanin, dømingartreytir og annað, at prix leggur upp til, at vit fáa ein sýnisglugga út í heim, og so framvegis.

Men kjakið eigur ikki at verða so skiti, sum tað er, har oftast verður farið eftir manni, heldur enn bólti.

Tí vit tosa ikki um ítrott ella annað, har bert eittans úrslit er hitt einasta rætta út í síðstu kommatøl. Hetta er list og harvið metingin hjá hinum einstaka, ið telur. Ongin svarlisti finst, ongin facitlisti, við røttu kommatølunum.

So lat okkum ríða eitt sindur niða á aftur og fáa kjakið á eitt støði, sum er sømuligt og sámuligt. Fótbóltsmentaliteturin - skilt sum fjepparar av harða slagnum, hooligans - hoyrir ikki heima her, tí tað at øll sita inni við einum úrslitið, sum tey halda vera hitt rætta, fyri síðani at fara út krevja sín rætt við svørði í hond, er ikki júst rætta mannagongdin.

Tak støðu og fegnast ella ilskast. Men gev teimum frið, ið hava meldað seg til prix og eru komin í semifinalu ella finalu. Ein kann næstan smílandi siga, at tað er ikki teirra skuld:)

### FAKTA

**Víðari í finaluna komu:**
Eyðun Nolsøe og Showmenn, Gogo Blues og Terji Rasmussen Band

**Vald til ymsu festivalarnar:**
Ólavsøkukonsert; Lama Sea
Summarfestival: Lawets
G! Festival: Makrel

Spæla í Mentanarhúsinum 16. apríl saman við norku Gåte: Lama Sea og Terji Rasmussen Band




LÆRLINGUR

til Idé Møblar

Idé møblar sóknast eftir einum evnaríkum og miðvísum lærlingi, ið kundi hugsað sær útbúgving í okkara spennandi møblahúsi.

**Okkurt um teg**
Vit vænta av tær, at tú hevur handilsskúlaútbúgving og hevur hug at arbeiða við íbúðarinnrætting. Tú hevur sjálvsálit, ert fyrikomandi og opin.

**Okkurt um okkum**
Vit bjóða eitt spennandi starv í einum nútímans møblahúsi, ið setir tænastuna í hásæti. Arbeiðsviðurskiftini eru góð við skiftandi arbeiðstíðum innan fyri eina vanliga arbeiðsviku. Uppi í lærutíðini er eisini skúlagongd á Handelsfagskolen í Odder.

**Umsókn**
Send eina stuttorðaða lýsing, merkt lærlingur, til okkara skjótast gjørligt. Vit hava brúk fyri tær at byrja sum skjótast, men vit bíða gjarna eftir tí rætta.

IDEmøblar

**Uppi á Hálsi · Tel 35 46 80**